Fylgiskjal 12

Almanna- og Heilsumálaráðið

Tórshavn 09.02.2026

<u>Viðmerking – til uppskot til løgtingslóg um leigustuðul</u>:

Fari. sum ein vanligur borgari, at loyva mær at koma við viðmerking til lógaruppskoti um leigustuðul.

Viðmerking mín, snýr seg um, at tað møguliga er neyðugt, at tillaga aðra lóg, soleiðis at borgarar ikki verða ymiskt behandlaðir í almenna systeminum.

Ætlaða løgtingslógin um leigustuðul, leggur upp til at borgari kann fáa upp til max kr. 1.500 í leigustuðli um mánaðin.

Soleiðis sum Almannaverkið umsitur og tulkar Almannalógina, so verða ymiskar mótrokningar gjørdar í mun til tað almanna veiting sum borgarin hevur rætt til, ella hevur søkt um og fingið játtað.

Ein av Almennu veitingunum er "fyribils uppihalsveiting vegna arbeiðsloysi". Her tulkar og mótroknar Almannaverkið soleiðis:

- Rentustuðul verður mótroknaður við faktor 1,5.
- Rentustuðulin verður mótroknaður í pensjónsgjaldinum.

Mær kunnugt, so tulkar og umsitur Almannaverkið lógina um td "fyribils uppihalsveiting vegna arbeiðsloysi" har borgarin eigur egna íbúð, rekjuhús ella sethús soleiðis sum nevnt er omanfyri, at rentustuðul verður mótroknaður við faktor 1,5 og at rentustuðulin verður mótroknaður í pensjónsgjaldinum.

Gangi út frá, at lógin um leigustuðul vil viðføra, at borgarar sum fáa td "fyribils uppihalsveiting vegna arbeiðsloysi" og búgva til leigu. Har borgarin hevur rætt til samb lógaruppskotinum til kr. 1.500 í leigustuðli, so vil almannaveitingin minka við kr. 1.500 x 1,5 = 2.250 kr. minni útgoldið í Almennaveiting, umframt at Almannaverkið mótroknar somu upphædd í pensjónsgjaldi eisini.

Skal vísa á hetta við einum dømi.
Almannaveiting – fyribilsuppihaldaveiting vegna arbeiðsloysi, stakur borgari eldri enn 25 ár uttan børn undir 18 ár.
Veiting kr. 15.879,00
Eftl løn 12% kr. 1.905,48

Borgarni eigur egna íbúð, rekjuhús ella sethús:
Fær borgarin rentustuðul (vit áseta rentustuðulin til kr. 950,00 sum dømi):
Veiting kr. 15.879,00.
Útgjaldingar grundarlag 15.879,00
– mótrokning 950 x 1,5 = 1.425,00
Útgoldið verður 15.879,00 – 1.425,00 = kr. 14.454,00.
Hetta merkir at borgarin missur kr. 475,00 í Almannaveiting pga av einari millumrokning sum ongin skilur.

Men sama mótrokning ávirkar eisini Pensjónsgjaldi:
Pensjónsgjaldi - lægsta lógaráseta gjald fyri 2026 er 12%.
Útgjaldsgrundarlag, her brúkar Almannaverkið brutto tali, tvs eftir mótrokning av rentustuðlinum.
Kr. 14.454,00 x 12% = 1.734,48.
Borgarin missur kr. 1.905,48 – 1.734,48 = kr. 171,00 í pensjónsgjaldi.

Um lógin um leigustuðul verður samtykt, so verður mismunur gjørdur millum borgarar, í eiga í mun til tey sum leiga, undir omanfyri nevndu fyritreytunum um Almannaveiting.

Well, tá man vísur á ein trupuleika / skeivleika, so hugsi eg, at eg fari at loyva mær at skjóta upp, eina nemma loysn, í er í 3 punktum.

1. Strika ásetta stykki í almannalógini um at "inntøka / onnur inntøka" skal faldast við 1,5.
2. Strika krav um mótrokning, og nevn rentustuðul positiv í lógartekstinum.
3. Harmonisera lóginar – um rentustuðul, leigustuðul og Almannaveiting soleiðis at gjøgnumskykni er. Borgarin hevur ikki orku og yvirksot at royna slík mál hjá Kærustovni.

PS. Um yvamál er um tulkingina hjá Almannaverkinum um mótrokning av rentustuðlinum, so kann eg veita tykkum dokumentatión fyri omanfyristandandi.

Vinaliga

Bogi Holm Mikkelsen
Berjabrekka 101
100 Tórshavn